# Smyril argar vágbingar

**Enn eina ferð var tað í framúr endaspurti, at vágbingarnir settu alla mótstøðu upp á pláss, og nú skal vilja verri enn illa til, um FM heitið ikki endar í Vági**

6-MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*

Tað krevur sín mann at vera viðhaldsfólk hjá 6-mannafarinum Smyrli úr Vági. Hvørja ferð verður roknað við, at teir skulu vinna. Teir vinna ofta, og teir eru so greiðir favorittar til FM heitið, at tað ikki ber til at ímynda sær annan FM vinnara. Men sterku og væl trimmaðu ungu menninir, sum eftir lokna skúlagongd í høvuðsstaðnum nú allir eru aftur í Vági, so at siga spæla við hvørt við heilsuna hjá viðhaldsfólkunum!

Dømi um hetta var í Fuglafirði leygardagin, tá ið blóðtrýstið á vágbingum leingi mundi vera sera høgt og neglirnar bitnar heilt í botn, áðrenn tað var greitt, at aftur hesa ferð var teirra bátur - eftir vónbrotið á Jóansøku - tann besti.

Smyril fekk ikki besta startin. Smyril var ikki millum tveir teir fremstu, tá ið bátarnir fóru um túsund metra málið, og Smyril var ikki fremstur, tá ið tað varð farið undir endaspurtin. Men Smyril var fremstur, tá ið tað ráddi mest um at vera fremstur, og tað var eingin ivi. Á málinum var munurin frá Smyrli og aftur til næstu kappingarneytarnar ein stór hálv bátslongd.

Fremsta plássið og hóast alt sannførandi sigurin vunnu vágbingar í framúr endaspurti. Við tøkum, sum ikki sóu sín líka í Fuglafirði, tóktist tað sum um hinir bátarnir so at siga stóðu fastir í siropi, meðan Smyril fór skúmandi ella flúgvandi fram í oddin. Hann var fremstur á seinastu 50 metrunum, og tað var yvirhøvur eingin ivi á málinum.

Á fyrstu metrunum bjóðaðu aðrir seg fram. Eitt nú nýggi Sundabáturin, sum tað tykist ganga rætta vegin hjá, og so Hvessingur. At báturin úr Hvalvík/Streymnesi er komin afturíaftur er áhugavert. Hann hevur áður vunnið so nógv, men í ár hevur ikki borið teimum til at manna bátin fyrrenn til Jóansøkuna. Undan ferðini til Suðuroyar høvdu teir verið eina ferð í bátinum og vant. Undan Varmakeldustevnuni høvdu royndu rógvararnir havt møguleika at venja nakrar ferðir afturat, og á fyrstu hundrað metrunum vístu teir tenn. So var ikki meiri í teimum, men kanska teir fara at gera um seg og arga hinar á Ólavsøku.

Páll Fangi legði bragdligast fyri. Tað eydnaðist hjá teimum at nýta sama taktikkin, sum á Fjarðastevnuni hevði sigurin við sær. Páll Fangi var leingi fremstur. Á túsund metra málinum var munurin aftur til hinar ein hálv bátslongd, og tá ið teinurin var hálvarógvin, høvdu teir økt munin eitt sindur afturat.

Tá var fjarstøðan frá Páll Fanga og aftur til Smyril, sum var aftanfyri Lóm, ein bátslongd. Men so var tað, at vágbingar fóru at leggja meiri í. Krútið hjá teimum var sterkari, enn tað var hjá klaksvíkingum, sum aftur noyddust at smyrja seg við, at Smyril er bestur.

Á Jóansøku tók Jarnbardur Smyril, Páll Fanga og allar hinar á bóli. Hesa ferð var Jarnbardur ongantíð fremstur, men hann megnaði at enda á bronsuplássinum, og hann er framvegis favorittur at vinna silvurmerkini í FM kappingini. At gullið fer til Vágs er tað eingin ivi um.

# Kappróðrarúrslit á Varmakeldu 2003

**50 bátsmanningar róðu FM-róður á Varmakeldu í Fugafirði. Úrslitini vóru hesi:**

**Fimmmannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havfrúgvin | 5:07:07 |
| 2 | Sílið | 5:08:04 |
| 3 | Tjaldrið | 5:17:24 |
| 4 | Blikur | 5:18:06 |
| 5 | Junkarin | 5:24:04 |
| 6 | Fípan Fagra | 5:27:06 |
| 7 | Báran | 5:28:13 |
| 8 | Royndin Fríða | 5:29:19 |
| 9 | Firvaldur | 5:36:23 |
| 10 | Kollur | 5:38:10 |

**Seksmannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 5:25:10 |
| 2 | Jarnbardur | 5:25:16 |
| 3 | Páll Fangi | 5:27:22 |
| 4 | Lómur | 5:31:18 |
| 5 | Smyril | 5:36:05 |
| 6 | Fuglfirðingur | 5:48:10 |
| 7 | Fortuna | 6:09:24 |

**Fimmmannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Drekin | 5:29:22 |
| 2 | Havfrúgvin | 5:30:24 |
| 3 | Blikur | 5:32:03 |
| 4 | Sílið | 5:33:24 |
| 5 | Firvaldur | 5:37:19 |
| 6 | Ørnin | 5:39:06 |
| 7 | Junkarin | 5:41:05 |
| 8 | Fípan Fagra | 5:45:12 |
| 9 | Tjaldrið | 5:57:19 |
| 10 | Kollur | 6:11:03 |
| 11 | Hulda | 6:14:06 |

**Seksmannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 07.36.07 |
| 2 | Páll Fangi | 07.38.05 |
| 3 | Jarnbardur | 07.40.08 |
| 4 | Strálan | 07.40.11 |
| 5 | Lómur | 07.41.19 |
| 6 | Sølmundur | 07.43.11 |
| 7 | Gongurólvur | 07.44.06 |
| 8 | Sundabáturin | 07.45.11 |
| 9 | Riddarin | 07.57.03 |
| 10 | Hvessingur | 08.03.10 |
| 11 | Fortuna | 08.13.06 |
| 12 | Kollfirðingur | 08.17.18 |

Snopprikkur møttið ikki

**Áttamannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 07,13,63 |
| 2 | Kvívíkingur | 07.17..67 |
| 3 | Argjabáturin | 7:18:02 |
| 4 | Knørrur | 7:22:50 |
| 5 | Teistin | 7:53:04 |

**Tíggjumannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 9:23:06 |
| 2 | Nólsoyingurin | 9:24:10 |
| 3 | Havnarbáturin | 9:27:02 |
| 4 | Vestmenningur | 9:30:15 |

# Støðan í føroyameistaraskapinum í kappróðri

**Eftir róðurin á Varmakeldu er støðan í føroyameistaraskapinum í kappróðri henda:**

**Fimmmannafør, dreingir**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 31 |
| 2 | Havfrúgvin | 28 |
| 3 | Blikur | 18 |
| 3 | Tjaldrið | 18 |
| 4 | Fípan Fagra | 6 |
| 5 | Roydin Fríða | 4 |
| 5 | Junkarin | 4 |
| 6 | Kollur | 1 |
| 7 | Bárnan | 0 |

**Seksmannafør, kvinnur**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 35 |
| 2 | Páll Fangi | 22 |
| 3 | Lómur | 17 |
| 4 | Jarnbardur | 15 |
| 5 | Smyril | 10 |
| 6 | Fuglfirðingur | 6 |
| 7 | Fortuna | 5 |

**Fimmmannafør, gentur**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 26 |
| 2 | Sílið | 24 |
| 3 | Havfrúgvin | 23 |
| 3 | Drekin | 23 |
| 4 | Firvaldur | 7 |
| 5 | Ørnin | 6 |
| 6 | Fípan Fagra | 2 |
| 7 | Kollur | 0 |
| 7 | Junkarin | 0 |
| 7 | Tjaldrið | 0 |
| 7 | Hulda | 0 |

**Seksmannafør, menn**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 31 |
| 2 | Jarnbardur | 25 |
| 3 | Páll Fangi | 19 |
| 4 | Strálan | 17 |
| 5 | Lómur | 9 |
| 6 | Sølmundur | 4 |
| 6 | Gongurólvur | 3 |
| 7 | Sundabáturin | 2 |
| 8 | Snopprikkur | 0 |
| 8 | Kollfirðingur | 0 |
| 8 | Fortuna | 0 |
| 8 | Riddarin | 0 |

**Áttamannafør**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 35 |
| 2 | Argjabáturin | 23 |
| 3 | Kvívíkingur | 21 |
| 4 | Knørrur | 16 |
| 5 | Teistin | 10 |
| 6 | Toftabáturin | 3 |
| 7 | Gullbrandur | 0 |

**Tíggjumannafør**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 31 |
| 2 | Nólsoyingurin | 26 |
| 3 | Havnarbáturin | 22 |
| 4 | Vestmenningur | 16 |



# Triða árið á rað

**John Rødgaard vann í suverenum stíli FM í snartalvi, sum varð telvað leygardagin**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tað var væntað framanundan. John Rødgaard, sum hevur vunnið FM í snartalvi í 1998, 2001, 2002 og nú í 2003, var favoritturin yvir øllum. Hann hevur annars ikki havt eitt gott talvár. Ratingtal hansara er í øgiligari ferð farið skeiva vegin, og á feskasta ratinglistanum liggur hann á einum sjeynda plássi.

Tiltikin góður snartelvari hevur Rødgaard í mong ár verið. Hansara styrki er heilt einfalt, at hann ikki ger grov mistøk, sum vanliga eyðkennir snartelving við sínum einans fimm minuttum til hvønn telvara. Er ósvikaliga tryggur og tykist at bíða til mótstøðumaðurin hevur ovtelvað støðuna. Ein strategi, sum ikki ein og hvør kann nýta. Tað krevur góðar talvdygdir, tol og rutinu.

Leygardagin vann Rødgaard kappingina við heili seytjan stigum av átjan møguligum. Hans Kristian Simonsen var tann einasti, ið var førur fyri at taka stig frá snarmeistaranum.

Nakrar ferðir varð Rødgaard undir hørðum trýsti, eitt nú serliga ímóti Torkili Nielsen. Sjalvt um ein eigur at vera varin við at eftirmeta eitt snartalv, manglaðu bert millimetrar í fyri at Torkil vann, og at kappingin sostatt bleiv opin og spennandi. Rødgaard vann tó loksins hesa toppuppgerð, og eingin megnaði hareftir at nærkast Rødgaard. Ein uppirborin vinnari, ið vann FM-heitið triða árið á rað.

**Toppurin:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Rødgaard, John | VT | 17 av 18 |
| 2. | Berg, Olaf | HT | 13.5 |
| 3. | Nielsen, Torkil | ST | 12.5 |
| 4. | Poulsen, Martin | HT | 12 |
| 5-11 | Nolsøe, Eyðun | KTF | 11 |
| | Simonsen, Hans K. | KT | 11 |
| | Samuelsen, Carl E.N. | HT | 11 |
| | Dragaberg, Rúni | KTF | 11 |
| | Ziska, Bogi | TT | 11 |
| | Thomsen, Heri V | KT | 11 |
| | Joensen, Jógvan | HT | 11 |
| 12. | Simonsen, Ólavur | KTF | 10.5 |

### Gott stríð um annað pláss

Jøvn kapping varð um annað plássið. Sum tað sæst á stigatalvuni, vóru tað serliga teir tríggir Olaf Berg, Torkil Nielsen og Martin Poulsen, sum bardust um heiðurin at verða næsti maður eftir Rødgaard. Tó so, sjálvt Ólavur Simonsen, sum endaði á einum tólvta pláss, hekk leingi í oddinum og var loksins bert hálvt stig frá fimta plássi.

Olaf Berg var eins og vinnarin í góðum snarformi, og bleiv ungi havnarmaðurin ein uppiborin silvurvinnari. Hevði Olaf vunnið kappingina, varð hann yngsti FM-vinnarin í snartalvi nakrantíð. Hetta met eigur Ólavur Simonsen, sum bert var 17 ár, tá hann í 1994 vann FM-snar.

Silvurvinnarin frá í fjør, Torkil Nielsen, endaði trifremstur á hesum sinni, og leikti somuleiðis eina góða kapping. Talentið er øgiligt hjá sandavágsmanninum, sum seinast - og einastu ferð higartil - í 1986 vann FM í snartalvi.

Telvað varð í Kommunuskúlanum, og sum vant stýrdi Eyðun Lamhauge kappingina óføra væl sum dómari, vegleiðari og umfarleggjari. Í alt luttóku 46 telvarar, sum er fimtan fleiri enn í fjør. Kappingartalvan og annað kann lesast á faroechess.com.



*John Rødgaard vann FM í snartalvi um vikuskiftið. Hetta er triðja ferðin á rað, at John vinnur*
Savnsmynd

